# Uppskot til útferðir/aktivitetir í Vestmanna

Hesum kunnu vit hjálpa við...

**Vestmannabjørgini** – Víðagitni túrurin við báti til vestursíðuna á Norðurstreymoy. Vitja holur, gjáir og fuglabjørg. Alternativur túrur til Trøllkunufingur. Tekur umleið 90 minuttir.

**Slættanes** – Sigl til gloymdu niðursetubygdina á Vágoynni, har 80 fólk búðu undir krígnum, men tey síðstu fluttu burtur í 1964. Eisini ber til at ganga annan vegin.

**Gongutúrur í viðarlundini/niðan í gjónna** – Vitja vøkru viðarlundina, sum børnini hava plantað. Og far víðari niðan í gjónna til eina heilt sjáldsama uppliving.

**Skjóting til máls úti á Berg** – royn teg og vita hvussu nógvar leirdúgvur tú rakar.

**Eftir bygdagøtuni úr Hvalvík til Vestmanna** – Ein frálíkur og miðaltorførur túrur eftir fjøllunum.

**Gongutúrur út á Rógvuendan** – Vilt tú hava meira spenning og brattlendi, so er hetta túrurin. Tá tú kemur heilt út á endan er útsýnið einastandandi.

**Vitjan á Faer Isles Distillery** – Í Vestmanna er nýliga latið upp nýtt brennarí sum framleiðir ymiskt sløg av brennivíni. Har ber til at fáa rundvísing og eina smakkiroynd.

**Fiskitúrur** – Tú kanst fara sjálvur við jollu inni á havnini ella longri saman við skipara.

**Máltíð á Fjørukrónni** – Her er tað bara hugflogið og pengapungurin sum setir avmarkingarnar.

**Søgusavnið** – Einasta voksmuseum í Føroyum.

**Søgan um SEV og Ólav á Heygum** – visti tú at Ólavur á Heygum, hvørs standmynd nýliga er komin at standa Inni á Fjørð í Vestmanna, legði hornasteinin undir bæði SEV, BankNordik og Føroya Tele?

**Kajakrógving á Vágni** – Ein stuttlig og hugtakandi felagsuppliving ein góðan dag. Tú kanst til dømis koma heilt nær at laksinum á vágni.

**Vestpack** – Hvar koma dagligdagsvørurnar úr plasti frá? Ein hugtakandi rundvísing á eini av framskygdu ídnaðar fyritøkunum í Føroyum, sum í dag fæst við nógv annað enn plast.

**Søguligur gongutúrur í bygdini** – Hoyr um sjórænaraálop og Gálgarðin har sjórænarar vórðu hongdir. Vitja gomlu krambúðina og bygdarsavnið.



*Fleiri spennandi støð at fara við kajakkini.*